

Ein av dómarunum segði seg fáa gásarhold, tá ið Guðrun sang Run To You hjá Whitney Houston

# Guðrun var aftur millum tey bestu

**Guðrun Sólja Jacobsen sang seg fríggjakvøldið í stóru og endaligu finaluna í sangkappingini Stjørna í eitt kvøld. Hon fær harða kapping í finaluni fríggjakvøldið**

TÓNLEIKUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Tað verða størstu profilarnir í sangkappingini Stjørna í eitt kvøld, sum fríggjakvøldið fara at kappast í endaligu finaluni í kappingini.

Hetta er seinastu ferð, at kappingin verður hildin, og nú tann seinasta finalan – endaliga uppgerðin, sum DR kallar – verður á skránni, verður ein føroysk songkvinna millum finalistarnar.

Guðrun Sólja Jacobsen var við í hálvfinaluni fríggjakvøldið, og hon var ein av teimum trimum, sum fólk vildu síggja aftur í finaluni.

Eina litrík Guðrun sang ein av kendu sangunum hjá amerikansku songkvinnuni Whitney Houston, Run To You, og tað var sum vanligt sannførandi. Og tað gav eisini bonus við einum tryggum finaluplássi.

## Gásarhold av Guðrun

Saman við Guðrun Sólju Jacobsen komu eisini vinmaður hennara, Jacob Andersen, og Jan Nielsen í finaluna, og dómarapanelið hevði nógvar rósur at bera sangarunum.

Jan Lysdahl, sum er ein av dómarunum, segði seg fáa gásarhold, tá ið Guðrun sang, og tá ið tað snúði seg Jacob Andersen, tosaði hann um eina kloakk – tað skuldi skiljast positivt, tí røddin á tí framúr góða sangaranum er skitin og rá.

Jan Nielsen var við í hálvfinaluni, tí dómararnir kundu velja eina av sangarunum, sum ikki kom víðari frá teimum innleiðandi umførunum til hálvfinaluna, og tað eydnaðist honum at gera vart við seg í kappingini, so at hann snúkti seg fram um Thomas Thordarson, sum tað var rokna við skuldi enda í finaluni saman við Jacob og Guðrun.

## Hørð kapping í Herning

Tað verða seks fólk, sum fara at syngja í finaluni fríggjakvøldið.

Stóra showið verður í Herning, og har skal Guðrun kappast við James Sampson, Jacob Andersen, Lene Mathiesen, Jan Nielsen og Martin Pedersen.

Tveir fyrrverandi vinnarar í kappingini eru við í finaluni, tí umframt Guðrun hevur eisini James Sampson vunnið kappingina áður. Tey mugu eisini saman við Jacob Andersen roknast sum favorittar til vinna hesa seinastu kappingina.

Til finaluna, sum SvF fer at samsenda við DR fríggjakvøldið, verða onkrir serligir gestir, sum fara at syngja. Big Fat Snake og Sanne Salemonsen eru tveir teirra, og tann triðji skal ikki avdúkast fyrr enn í sjálvari finaluni.

TASKI ...mest seldu gólvvaskimaskinur
SWINGO 750/1250B

A.H.Jensen
TEL 322676

**Mekanikari**

**søkist til Shell á Frælsinum!**

Verkstaðið hjá Shell á Frælsinum søkir eftir mekanikara til alt mekaniskt arbeiði.

Tann ið settur verður fær eitt sera fjølbroytt og spennandi starv við nógvum ymiskum uppgávum

**Førleikakrøv**
Vit vænta, at tann ið settur verður, er
- Útbúgvin mekanikari
- Hevur góðan røkjuskap
- Hevur góð samstarvsevni

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at ringja tel 217355/312112 til Geir Wardum støðleiðara

**Umsóknir**
saman við viðmælum, upplýsingum um útbúgving og royndir, skulu sendast innan 1. mars 2005 til

Føroya Shell P/f
Viðarnes
FO-100 Tórshavn
Viðm.: Mekanikari



www.shell.fo




Ísland liggur beint við og er kortini langt frá tí, vit eru von við. Hvør árstíð hevur sína sjarmu og sínar serligu upplivingar. Leigar tú bil, hevur tú frítt at fara. Uppliva jøklarnar á kavaskutara, ríð á rossabaki í stórslignu náttúruni ella svim í Bláa Lóni við kavaflykrum á nøsini. Og hvat við at enda dagin við einum býtúri í Reykjavík, har matur og móti er ein lívsstílur.

**Gisting í "Room with a view"**
í 3 nætur fríggjadag til mánadag.
2 vaksin og 2 børn fyri: **5.995,-**
Íroknað prísin er flogferð, gisting og øll avgjøld

**Børn 10 krónur**
(Íroknað ferðaavgjald 148,-)

Hvør vaksin, ið ferðast til Íslands við Atlantic Airways, kann hava eitt barn við sær fyri einans 10 krónur pluss ferðaavgjald. Eitt frálíkt høvi hjá familjuni til felags upplivingar.

Bílegg ferðina á tínari ferðaskrivstovu ella hjá Atlantic Airways.

Vanligir ferðaseðlar kunnu bileggjast á atlantic.fo

ATLANTIC AIRWAYS
www.atlantic.fo